

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 06 - 2012

# Verkfallið kostar 30 mió. um dagin

Tað kostar norsku oljuvinnuni og norska samfelagnum nógvar pengar, at Safe-liminir hjá tænastufyritøkuni Baker Hughes fóru í verkfall gjáramorgunin. Avgerðin bar í sær, at 114 fólk, sum arbeiða á 12 pallum á norska landgrunninum, løgdu arbeiðið niður. Teir Safe-limirnir, sum arbeiða hjá Baker Hughes, vilja hava egnan sáttmála og sýta fyri at ganga undir sáttmálan, sum er galdandi fyri aðrar tilsvarandi fyritøkur. Men arbeiðsgevararnir í Oljeindustriens Landsforening vilja ikki gera nakran sersáttmála. Arbeiðsgevararnir hava roknað út, at verkfallið kostar samfelagnum og feløgunum 30 milliónir krónur um dagin. Arbeiðsgevararnir vilja ikki siga, hvussu meint verkfallið rakar tey einstøku oljufeløgini, men tað er greitt, at Statoil er tað felagið, sum er meinast rakt. Men onnur feløg so sum Shell, Centrica, Exxon Mobil, Eni og Halliburton eru eisini rakt, skrivar Aftenbladet. Arbeiðsgevararnir hava sagt, at verkfallið er ólógligt, og at tey, sum eru farin í verkfall, eru farin í eitt stríð, sum tey ikki kunnu vinna.